# Ársfrágreiðing fyri Vísindasiðseminevndina 2023

Vísindasiðseminevndin er sett við heimild í "Lov om et videnskabsetisk komitésystem og behandling af biomedicinske forskningsprojekter", sum varð sett í gildi við kongligari fyriskipan í 2013, seinast broytt 29. juni 2021.

Nevndin hevur sjey limir, fýra leikfólk og trý fakfólk við granskingarroyndum innan heilsuvísind.
Fyrst í 2023 vóru 4 nýggir limir valdir í Vísindasiðseminevndin.

Limirnir í 2023:

- Gunnhild Helmsdal, cand.med og granskari (fakfólk)
- Kári Purkhús, cand.scient í lívfrøði og ítrótti (leikfólk)
- Poula Reinert-Petersen, cand.scient.san og leiðari innan eldraøkið (leikfólk)
- Jan Rasmussen, cand. med. PhD, yvirlækni (fakfólk)
- Jóhanna Petersen, cand. med. PhD, yvirlækni (fakfólk)
- Sólja í Ólavsstovu, løgfrøðingur (leikfólk)
- Hilmar Augustinussen, KT-serfrøðingur, limur í Sjúklingaráðnum og Alzheimerfelagnum (leikfólk)

Skrivari: Ann E. Østerø

Endamálið hjá Vísindasiðseminevndini er at tryggja, at heilsuvísindaligar granskingarverkætlanir eru skipaðar á vísindasiðsemiligum tryggum grundarlagi. Sum grundregla skulu rættindi og tryggleiki hjá royndarpersóninum takast framum vísindalig og samfelagslig áhugamál í heilsugransking.

Avgerðir hjá føroysku vísindasiðseminevndini kunnu kærast til NVK (Nationale Videnskabsetiske Komité) í Danmark. Sami kærumøguleiki er fyri avgerðir tiknar av staðbundnu vísindasiðseminevndunum í Danmark.

Umframt lóggávuna fyriheldur nevndin seg til almennu meginreglurnar hjá NVK, soleiðis sum tær eru tøkar á heimasíðuni www.nvk.dk.

## *Virksemi*

Nýggja nevndin hevur víst á tørvin á hægri játtan til skrivara á hálva tíð. Skrivarin skal tryggja, at Vísindasiðseminevndin hevur møguleika fyri at avgreiða innkomin mál innan ásettu tíðarfreist sambært lógini um vísindasiðsemi.
Skjalatilfarið gjøgnum seinastu 10 árini vísir, at granskingarverkætlanirnar gerast fleiri í tali, umframt at tilfarið er rúgvusmiklari og ofta torgreiddari enn áður.

### *Fundir og umsóknir*

Nýggja nevndin hevði 10 fundir. Nevndin viðgjørdi 25 umsóknir og fyrispurningar viðv. granskingarverkætlanum, harav:

3 nýggjar verkætlanir vóru góðkendar
7 ískoytis-, broytingar- og uppfylgingarverkætlanir vóru góðkendar
7 verkætlanir fingu longda freist
5 verkætlanir kravdu ikki góðkenning
3 fyrispurningar um verkætlanir og innlit fingu svar

Í hvørjum einstøkum føri kom nevndin til eina felags niðurstøðu, og ongin niðurstøða kravdi atkvøðugreiðslu í nevndini.
Av 25 umsóknum og fyrispurningum kravdi ein verkætlan longri enn 60 daga viðgerð, orsakað av at verkætlanin var ófullfíggjað og mátti tillagast áðrenn viðgerð.

### *Góðkendar verkætlanir 2023*

1. *"Útsetilsi áðrenn og eftir føðing fyri flourevni og ábendingar um heilsuárin í pubertetinum ábendingar um heilsuárin í pubertetinum" – Uppfylging - Kohorta 5.*
2. *"FarGen 2 – rekruttering" – Broyting.*
3. *"The efficacy of implementing nurse-performed ultrasound-guided peripheral intravenous access in oncology patients: a prospective interventional clinical study".*
4. *"Identifying susceptibility genes associated with hereditary breast and ovarian cancer (HBOC) syndrome in the Faroese population" – Leinging.*
5. *"Barnakrabbi í Føroyum og ílegur".*
6. *"Útsetilsi áðrenn og eftir føðing fyri flourevni og ábendingar um heilsuárin í pubertetinum" – Broyting.*
7. *"Demens/Alzheimerøs sjúka í Føroyum – ein genetisk, umhvørvis og ættarbandskanning" – Leinging.*
8. *"Multifactorial modelling of Parkinson's Disease in the Faroe Islands – a longitudinal study/Parkinson sjúka í Føroyum – ein langtíðar kanning" – Leinging*
9. *"Útsetilsi áðrenn og eftir føðing fyri flourevni og ábendingar um heilsuárin í pubertetinum" – Ískoyti.*
10. *"Kanning um kunningina tey síðstu 40 árini viðvíkjandi dálkingaevnum í grind".*
11. "Grønstær i Færøernes Befolkning" – Leinging.
12. "Grønstar (glaukom) í føroyska fólkinum"– Broyting.
13. *"FarGen-PGx"* – Leinging.
14. *"FarGen-PGx"* – Broyting.
15. *"HBOC" – Leinging*
16. *"HBOC" – Broyting*
17. *"Mikrobiom og Parkinson sjúka" – Leinging*